# Rás2 stjórin fegin um árið

**- Vit hava gjørt tað ómøguliga aftur í ár, sigur Jonhard Hammer, sum er stjóri á Rás2. Hann fegnast um, at 2009 var eitt gott og hendingarríkt ár hjá rásini**

**RÁS2**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


*- Eg vil gjarna takka okkara starvsfólki fyri ein fantastiskan innsats í 2009, sigur Jonhard Hammer*

Stjórin á Rás2 er sera fegin um árið, ið nú er við at fara aftur um bak. Privata útvarpsstøðin Rás2 hevur í 2009 verið ein týðandi partur av føroyska miðlaheiminum, og stjórin heldur, at í grundini hevur rásin gjørt nakað ógjørligt.

- Sum treytirnar hjá okkum eru, skuldi tað næstan ikki borið til at ríkið eina útvarpsstøð á hendan hátt, sum vit gera, men vit hava gjørt tað ómøguliga aftur í ár. Tað er fyrst og fremst takka verið fantastiskum starvsfólkum, sum leggja nógv meira í arbeiðið, menn vit í grundini kunnu krevja, sigur Jonhard Hammer, stjóri.

- Vit hava eisini havt góðar samstarvspartnarar og ídnar lýsarar, og tí bar tað aftur í 2009 til at reka Rás2, sigur hann.

## Nógv á skránni

Rás2 hevur aftur í 2009 spílað seg út í ymsum samanhangum, og stjórin er serstakliga fegin um nógvar av teimum stóru ætlanunum hjá rásini.

- Oyggjaleikirnir í summar vóru eitt avrik av teimum óvanligu hjá okkara fólki, og tað hava vit eisini hoyrt nógv gott fyri, men vit hava nógvar aðrar stórar løtur. Vit savnaðu aftur í ár 15000 fólk í Vágsbotni á ólavsøku, okkara summarradio og jólaradio hevur verið sera góð og livandi, fótbóltssendingin 3. Hálvleikur er víðagitin, og so eru afturvendandi Hvonn Live sendinginar nakað av tí besta og mest eksklusiva, sum finst í føroyskum útvarpi, sigur Jonhard Hammer.

- Vit hava eisini ein gerandisdag, sum koyrir væl. Vit eru í luftini 17 tímar um dagin, og vit merkja stóran áhuga frá lurtarunum fyri okkara sendingunum. Vit skulu verða øðrvísi enn hinar útvarprásirnar. Vit skulu verða tað livandi, lívliga og stuttliga radio, og tað er eisini ætlanin fyri okkara virksemi í 2010.

- Eg vil gjarna takka okkara starvsfólki fyri ein fantastiskan innsats í 2009, uttan tey bar hetta als ikki til.

- Og eg vil eisini gjarna takka teimum, sum arbeiða saman við okkum, og sum brúka Rás2 sum lýsingamiðil, tí uttan inntøkur frá lýsarum, lat hetta seg ikki gera, tí vit byrja jú við null á hvørjum ári – vit hava ikki óteljandi almennar milliónir í rygginum til okkara virksemi, sigur Jonhard Hammer.

Nýggjársynskið hjá Rás2 stjóranum er stílað til politikararnar.

- Eg vóni, at politikararnir nú seta tað í verk, sum longu er samtykt, millum annað at Kringvarpið skal niðurlaga lýsingarnar. Og eg vóni ikki, at landsstýriskvinnan fer at drýggja arbeiðið við public service sáttmálanum í eitt heilt ár afturat, og at hon minnist til privatu miðlarnar í sáttmálanum, sigur Jonhard Hammer.




Verandi stjóri á Havstovuni fer frá vegna aldur, og søkt verður við hesum eftir nýggjum stjóra.

Havstovan hevur til endamáls at savna inn vitan, kunna og ráðgeva um livandi havtilfeingið og tess umhvørvi við skilagóðari gagnnýtslu fyri eyga.

Stjórin skal í samstarvi við Fiskimálaráðið virka fyri at menna og gjøgnumføra meginsetning, mál og strategi stovnsins.

***Ábyrgdarøki***

Sum stjóri hevur tú ábyrgdina av, at nógvu uppgávurnar á Havstovuni verða loystar á fullgóðan hátt. Somuleiðis skalt tú menna og grundfesta eina leiðslukunningarskipan, ið verður støðið undir avgerðum stovnsins langt fram í tíðina.

***Tú fært millum annað ábyrgdina av***

- at ráðgeva politiska myndugleikanum
- at stíla fyri gransking í fiskivinnu, havumhvørvi og havtilfeingi
- at skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi
- at skipa samstarvið við aðrar granskingar- og útbúgvingarstovnar í Føroyum og uttanlands.

***Vit leita eftir einum stjóra, sum***

- kann dokumentera førleikar á omanfyristandandi ábyrgdarøkjum
- hevur útbúgving frá lærdum háskúla, í minsta lagi á masterstigi ella kandidatstigi
- hevur kunnleika og royndir, ið kunnu setast í samband við starvið og høvuðsgranskingarøkið á Havstovuni
- hevur góð evni at samskifta í almenna rúminum og beinleiðis við føroyskar og útlendskar myndugleikar, vinnugreinar og yrkisbólkar
- hevur góð evni at samskifta skrivliga og munnliga á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- kann dokumentera evni at arbeiða óheft av uttanhýsis myndugleikum og áhugabólkum, evni at bróta upp úr nýggjum, evni at eggja og menna starvsfólk og evni at taka ímóti stórum avbjóðingum.

***Setanartreytir***

Starvið verður lønt ájavnt við 38. lønarflokk hjá Tænastumannafelagi landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv. Neyvari treytir verða ásettar í stjórasáttmála. Starvið verður áramálssett. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini.

***Umsóknir***

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu sendast Fiskimálaráðnum, stílað til Rógva Reinert, aðalstjóra, Postsmoga 347, 110 Tórshavn í seinasta lagi **hósdagin 14. januar 2010 kl. 12.00.**
Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rógva Reinert, aðalstjóra, á telefon 35 30 30.

SENDISTOVAN

**Fiskimálaráðið**

*Havstovan er vísindastovnur undir Fiskimálaráðnum. Havstovan skal millum annað gera kanningar av livandi tilfeinginum og tess umhvørvi í føroyskum sjógvi, eins og á havleiðum, har føroyska fiskivinnan hevur áhugamál. Stovnurin kunnar landsins myndugleikar og almenning um granskingarúrslit, eins og stovnurin ráðgevur myndugleikum um livandi havtilfeingið við skilabestu gagnnýtslu fyri eyga. Á Havstovuni starvast 39 fólk. 26 eru knýtt at sjálvum stovninum, og 13 eru knýtt at havrannsóknarskipinum Magnusi Heinasyni, ið er partur av stovninum. Sí annars heimasíðu stovnsins,* ***www.hav.fo.***